

*Hetta modellið vísir, akkurát hvar á Argjum ætlanin er at byggja nýggja kirkju. Kirkjan er einasta húsið við reising. Beint høgrumegin stendur møblasølan, Eikin, tvørtur um Sandá. Kirkjan stendur sostatt á stykkinum ímillum Støðlagøtu og Sandá. At kirkjan hevur reising á myndini, er bara fyri at hon skal síggjast aftur, tí tað er ongin sum helst avgerð tikin um, hvussu hon skal síggja út. Fæst loyvi at seta hana har, verður arkitektar bjóðaðir at kappast um at tekna kirkjuna og teir fáa at kalla fríar teymar. Einasta bindingin, er, at kirkjuráðið vil hava, at kirkjan skal hava flagtak fyri at vera í samsvari við tíðarinnar umhvørviskrøv. Ein onnur binding er, at ein partur av henni skal vera úr gróti fyri at heiðra niðurseturmenninar á Argjum, sum bóru orð fyri at vera hegnismenn og tiknir úr leikum sum grótlaðarar.*

**» Nú hava vit kravt, at ein avgerð fellur**

# Býráðslimir eru ov veikir

**KIRKJA Á ARGJUM Býráðslimir hava fleiri ferðir samtykt, at nýggj kirkja á Argjum skal byggjast við Sandá, men mótmælisfólk hava fingið býráðslimir at koppa á, sigur tann eini býráðslimurin, Jan Christiansen**

Áki Bertholdsen

– Býráðslimir eru alt ov veikir!

Tað er niðurstøðan hjá Jan Christiansen, býráðslimi, nú Býráðið enn einaferð skal viðgerða spurningin um, kirkjuráðið á Argjum skal sleppa at byggja nýggja kirkju við Sandá.

Jan Christiansen vísir á, at býráðslimir hava fleiri ferðir samtykt, at kirkjan skal byggjast millum Støðlagøtu og Sandá og býráðið hevur enntá samtykt at selja kirkjuráðnum hetta ávísa stykkið til endamálið.

– Málið hevur fingið eina serstakliga løgna viðgerð í býráðnum, sigur býráðslimurin.

Fyrst hevur byggi og býarskipanarnevndin einmælt samtykt at kirkjan skal staðsetast við Sandá og at broyta byggisamtyktina, so at tað kann lata seg gera.

Hetta var síðani staðfest av einum einmæltum býráði.

Síðani hevur fíggjarnevndin einmælt samtykt at selja kirkjuráðnum á Argjum hetta ávísa stykki til at byggja kirkju á.

Men tá ið talan er at selja kommunala ogn, skal tað fyri býráðið og tað kom hetta málið eisini.

Og tá samtykti býráðið enn einaferð einmælt at selja kirkjáðnum stykkið.

## Slingur í valsin

Men so kemur málið so fyri býráðið einaferð afturat at samtykkja, at broyta byggisamtyktina fyri hetta ávísa stykki, so at kirkja kann byggjast har.

**» Er vandi fyri, at Argir fer í tvíningar, verður ikki farið undir nýggja kirkju við Sandá**

– Og tá er tað, at slingur kemur í valsin, tí á tí býráðsfundinum møttu nøkur fólk, sum vóru ímóti at staðseta kirkjuna har.

– Og tá hendi tað løgna, at býráðslimir reistu seg upp, kropp av kroppi at mæla frá at byggja kirkjuna har, tí hesin grøni bletturin skuldi varðveitast.

Tað er so endað við, at biðið varð um at fáa málið fyri aftur í byggi- og býarskipanarnevndini og har liggur so málið nú.

## Veikleikatekin

Jan Christiansen ivast ikki í, at tað vóru hesi mótmælisfólkini, sum fingu býráðslimir at skifta meining.

Men hann heldur eisini avgjørt, at hetta er eitt veikleikatekin hjá býráðslimum, at teir ikki klára at standa við sína støðu, hóast ein ávís ónøgd tekur seg upp.

Hann heldur enntá, at hetta er eitt veikleikatekin fyri fólkaræðið og ger tað ótrygt at vera borgari í Havn, tí býráðið er ikki altíð at líta á.

Sjálvur heldur hann, at ein kirkja er eitt hábærsligt og stórfingið hús, sum er eitt kennimerki fyri eitt pláss.

Og hann hevur altíð hildið, at kirkjan stendur serstakliga væl á stykkinum ímillum Støðlagøtu og Sandá.

– Og tað haldi eg framvegis, leggur hann afturat.

aki@sosialurin.fo

## Blaka frá sær

– Vit hava arbeitt við ætlanini at byggja nýggja kirkju á Argjum nú í fimm ár. Og nú vilja vit hava eina avgerð.

Bjartur Dalsgarð, formaður í kirkjuráðnum á Argjum, sigur, at nú skal tað verða egg ella ungi við ætlanini at byggja nýggja kirkju á Argjum.

Ætlanin er at byggja kirkjuna ímillum Støðlagøtu og Sandá.

– Nú hava vit kravt, at ein avgerð fellur í málinum, sigur hann.

Hann leggur afturat, at tað hevur kirkjuráðið gjørt Tórshavnar býráði púra greitt.

Eydnast tað ikki, blakar kirkjuráðið frá sær.

Og hann leggur dent á, at loyvið skal umfata at kirkjan verður bygd á umrødda stykkinum við Sandá.

– Fáa vit ikki loyvi til tað, kastar kirkjuráðið frá sær, tí eftir at hava arbeitt við hesi ætlanini í fimm ár, fara vit ikki at byrja aftur á berum við eini aðrari kirkju á einum øðrum staði, sigur hann.

Hann sigur, at kirkjuráðið er valt fyri fýra ár.

– Men tað, sum er eftir av hesum valskeiðnum, fara vit ikki at verða annað enn ein avgreiðsluskrivstova, sum tekur ímóti og rindar rokningar, sigur hann.

Sjálvur er hann sannførur um, at hann sigur seg seg frá sum formaður.

– Eydnast hendan ávísa verkætlanin ikki er mest sannlíkt, at nýggj kirkja verður ikki bygd á Argjum tey næstu, nógvu árini, sigur Bjartur Dalsgarð.